Nýggja KOKS

# KOKS SKAL BYGGJAST SUM EIN HEILUR BÝLINGUR

*Nýggj staðseting er funnin til KOKS, sum seinastu árini hevur verið frammi við Gjónna. Stórfingin verkætlan er um at byggja Koks sum ein býling í Fossdali norðan fyri Velbastað. Vit hava hitt stjóran á Koks og kagað í verkætlanina:*

EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO

Nýggja Koks matstovan verður at kalla ein heil bygd. Økið sum talan er um, er eitt økið millum sjóvarmálan og landsvegin til Syðradals norðan fyri Velbastað frá Fossdalsgjógv og einar 2-300 metrar norður frá gjónni.

Økið er partur av Líðarhaga á Velbastað. Landsvegurin oman fyri økið liggur í umleið 115 metra hædd, og lendið hellur lutfalsliga javnt í ein landsynning frá landsvegnum oman móti sjóvarmálanum.

Mitt oman gjøgnum stykkið, umleið 120 metrar norðan fyri Fossdalsgjógv, rennur sera vakra Fossdalsá við fleir smærri fossum, hyljum og stórum klettum. Økið er lutfalsliga órørt av mannahondum, bert eitt skapilsi av einum dyrkingarvegi og ein grund frá einum niðurdotnum seyðhúsi er at síggja í lendinum. Við landsvegin oman fyri økið er eitt vendistykkið.

## So smá inntriv sum gjørlig

– Í stuttum er tankin at fremja so smá inntriv sum gjørligt, og at tey inntriv, sum eru neyðug, vera gjørd so varliga sum til ber, sigur Johannes Jensen, stjóri á Koks.

Frá landsvegnum er tankin at skipa økið soleiðis:

Parkeringsøki við innilokaðari ruskgoymslu á vendistykkið við landsvegin ovast.

Gera veg oman, sum skal nýtast til vøruflutning og flutning av gestum, tá tað krevst.

– Ætlanin er at gera ein einfaldan dyrkingarveg, sum verður ein leingjan av verandi vegi nakað longur norður, fyri síðan at leiða vegin suðuryvir aftur, oman til Norðara Býling, sigur Johannes Jensen.




Fossdalur er á vestursíðuni á Streymoy beint norðan fyri Velbastað

Ovari pílurin vísir Fossdalsá, niðari pílurin vísir Fossdalsgjógv. Sjálvv matstovan verður við Fossdalsgjógv, meðan norðari býlingurin fer at hýsa bygningum, sum hava við beinleiðis djórahald at gera

## Smáttur til gisting partur av norðrara býlingi

Norðari Býlingur verður staðsettur beint norðanvert Fossdalsá. Býlingurin fer í høvuðsheitum at hýsa bygningum, sum hava beinleiðis samband við djórahald, turking, royking og goymslur av ymiskum slag, tað vil siga fjós, seyðahús, hjallar, sornhús og líknandi. Harafturat verður skotið upp at staðseta møguligar smáttur til gisting, sum ein part av Norðara Býlingi. Í millum húsini í Norðara Býlingi verður teigalendi og urtagarðar, sum koma at veita rávøru til matstovuna.

Timburbrúgv verður gjørd um Fossdalsá við so fáum inntrivum sum gjørligt, beint sunnan fyri Norðara Býling.

Einfaldur lendisvegur verður gjørdur frá brúnni suður til Heimara Býling.



Pól Andrias Ziska hevur verið høvuðskokkur á Koks seinastu seks árini



Her síggjast teir báðir býlingarnar, sum ætlanin er at gera í Fossdali. Norðari býlingurin er meira til djórahald, hagreiðing og goymslu, meðan sjálv matstovan verður í heimara býlinginum við Fossdalsgjógv – har ein partur av matstovuni verður bygdur út yvir gjónna, har síggjast kann teir 70 metrarnar niður í gjónna

## Sjálv matstovan verður í heimara býlinginum

Í Heimara Býlingi er sjálvt matstovuvirksemið við øllum dagligum stuðulsfunktiónum. Hesin býlingurin er meira 'viðgjørdur' í mun til Norðara Býling, hús í einari og tveimum hæddum kring eitt steinsett tún. Framsíður, har gjørligt er at lata upp, so tún og innirúm til onkur høvi, kunna renna saman.

– Við sjóvarmálan hugsa vit, at ein einføld bryggja kann gerast. Hugsast kann, at gjørligt er at koma higar sjóvegis, tá veðrið loyvir tí. Tankin er somuleiðis, at økið við bryggjuna verður ein ítøkilig ímynd av sambandinum við havið. Her kann ymiskt úr sjónum vera lagt upp, sjógæti kann goymast fekst í innbygdum kistum í bryggjuni, smærri tiltøk fyri gestir kann fara fram í fjøruni, á bryggjuni, ella í neystinum Feski, sigur Johannes Jensen.

Smátturnar, ella rúmini til gisting fara at liggja tvey og tvey ymsastaðni í økinum, soleiðis at gjørligt verður at gista: Í briminum, við fossin, á bóndagarðinum, í hellinum, úti á nesinum ella í gamla seyðahúsinum.

Atgongd til gistingina er eftir einfaldum rásum.

Í staðin fyri at skapa eitt vælveruøki, sum vit vanliga kenna tað í sambandi við gistingina, so ynskja vit í staðin, at hesin parturin verður fullkomiliga samantvinnaður við náttúruna.

Vit skjóta upp, at heitar keldur vera gjørdar beinleiðis í helluna í fjøruni, beint niðanfyri bakkan. Hyljar í Fossdalsá verða nýttir til at svala sær á í, og undir fossinum á bakkanum kanst tú fáa tær eitt náttúrubað.

Bryggjan er sjálvsagt eisini ein møguleiki til eitt stutt havdypp, áðrenn farið verður í heitu keldurnar.



Tað er Ósbjørn Jacobsen frá ÓSBJØRN JACOBSEN ARKITEKT

AR, sum hevur teknað og gjørt skitsuprojektið til nýggja Koks





## Náttúra, søga og siðaarvur

Síðani Koks byrjaði fyri umleið átta árum síðani, hevur matstovan verið gjøgnum eina støðuga menning á flest øllum økjum, sum viðvíkja matstovu rakstri í breiðasta týdning.

Menningin er eisini galdandi fyri samleikan hjá KOKS. Tilknýtið til náttúruna, søgu og siðaarv hevur gjøgnum øll árini verið ein megintáttur, sum serliga seinastu árini, er vorðið ein enn greiðari og bjartari samleiki á altjóða matstovuhimmalinum.

Viðvíkjandi søgu og siðaarvi, so var flytingin fyrst frá hotellinum til Kirkjubøar, síðani til garðin frammi við Gjónna við Leynavatn, ein framhaldandi granskan og menning av samleikanum í mun til føroyska søgu og siðaarv.

Gist & Vist skrivar soleiðis í skitsuuppskotinum:

– Uppskotið til nýggja KOKS er ein tilvitað framhaldandi menning av samleikanum.

– Vit hava valt at taka støði í føroyska garðinum og býlinginum, vit øll kenna frá smáum føroyskum bygdasamfeløgum. Sjálvandi skal matstovan og gistingin í øllum lutum vera vælvirkandi í sínum funktiónsbygnaði. Her er tað áhugavert at síggja, at siðbundni hátturin at byggja tættar býlingar í føroysku náttúruni er sera væl egnaður og lutfalsliga léttur at laga til eina samansetta skrá, har neyv krøv eru til, hvussu ymiskar funktiónir innanhýsis eru bundnar saman. Tí er hevur íblásturin víst seg at vera hentur, bæði hvat viðvíkur at taka støði í einum siðbundnum bygnaði og at fáa eina vælvirkandi samlaða eind.

Harafturat hevur siðbundni býlingurin nakrar eyðsæddar dygdir. Dygdir, sum eru truplar at fáa eyga á í nútíðar bygging, serliga tá talan er um at skapa uttandura øki við góðari lívd, til at stuðla uppundir uttandura virksemi. Hettar er eitt aðalmál í skapanini av Nýggja KOKS, at matstovan ikki 'bert' er ein bygningur, men ein samansett livandi eind, sum eisini skapar uttandura dygdarrúm, eitt tún sum kann vera karmur um alskyns virksemi. Onkuntíð sjálvstøðugt við til dømis léttari matgerð á eldstaðnum fyri ein bólk av gestum, men eisini í samspæli við rúm, sum liggja út til túnið. Tankin er at Hagreiðingarrúm, Grovkøkur og Roykstovan kunna lata stóru hurðarnar upp og flyta ymiskt virksemi út í tún, soleiðis at gesturin upplivir eitt livandi umhvørvið kring túnið og eitt innlit í virksemi í ymisku húsunum. Onkur flettir eitt lamb í hagreiðingarrúminum, og fólk í grovkøkinum eru farin út í tún at hagreiða dagsins skurð av rabarbum – tað er bert hugflogið, sum setir mørk, býlingurin verður ein livandi vera í føroysku náttúruni, sum loyvir gestinum av fyrstu parkett at uppliva tilevningina av eini máltíð í breiðast hugsandi merking.

Á sama hátt sum við býlingsbygnaðinum, so hava vit eisini valt at nýta føroyska garðin sum íblástur. Á fleiri mótum umskarast garðurin og býlingurin, tá hugt verður at tí skipanarliga. Gomlu garðarnir hava mangan vaksið seg størri yvir eitt langt áramál, so hvørt sum tørvur hevur verið á fleiri funktiónum. Tí eru gomlu størru garðarnir oftani vorðnir heilir býlingar. Gamli garðurin er mangan bygdur kring eitt tún, sum er egnað til alskyns uttanduravirksemi. Harafturat er roykstovan ein miðstøð, ein snúningsdepil á garðinum, har alskyns virksemi fer fram. Her situr tú undir orðinum og virkar, her verður maturin hagreiddur og tilgjørdur. Alt annað virksemi á garðinum, hevur so ella so, eitt tilknýti til hettar hjartað á garðinum.